LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 23. oktober 2023
J.Nr.: LUM-16- 23/13510-42
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

um handfaringina hjá Runavíkar kommunu av einum fyrispurningi um eitt byggimál

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um, at Runavíkar kommuna ikki svaraði fyrispurningi frá klagara um eitt byggimál. Hóast talan var um mál, sum byrjaði fyri gott tveimum árum síðani, og klagarin hevði sent teldupostar til kommununa, starvsfólk hjá kommununi og til býráðslimir, so hevði kommunan ikki skrásett teldupostarnar og ikki svarað klagaranum. Umboðsmaðurin gav Runavíkar kommunu eina átalu fyri ikki at hava handfari málið nøktandi.*

## 2. Málslýsing og málsgongd

Við skrivi, dagfest 25. juni 2023, sendi A mær klagu um vantandi svar frá Runavíkar kommunu um eitt byggiloyvi. Klagan var soljóðandi:

> "Eg sendi ein fyrispurning til Runavíkar kommunu/*eitt starvsfólk* (*mín viðmerking)* um ólógliga bygging ímillum hús okkara, har eg haldi at byggi-/brunalógin verður brotin. *Kommunan (mín viðmerking)* svarar ikki og *formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini (mín viðmerking*) veit einki. Hann hevur so heldur ikki vent aftur um nakað, síðan hann segði, at hann einki visti um málið. ...
> ...
> Eg havi við jøvnum millumbili spurt inn til hesa sak, men her kemur einki svar ella handling.
> ...
> Nú havi eg bíða í so leingi.
> Havi spurt meg fyri hjá mínum tryggingarfelag hesum viðvíkjandi.
> Tey siga, at tey ganga út frá, at kommunan fylgir øllum byggi-/brunareglum."

Saman við klaguni sendi klagarin avrit av teldupostum, ið hann hevði sent til høvuðsteldupostadressuna hjá Runavíkar kommunu, starvsfólk hjá Runavíkar kommunu og býráðslimir í Byggi- og býarskipanarnevndini um málið.

Tann 19. august 2020, sendi klagarin soljóðandi teldupost til starvsfólk hjá Runavíkar kommunu:

> ”Fyrst vil eg siga, at eri keddur aftur at senda ein fyrispurning til tín.
> Havi ein nábúgva ...
> Hann hevur *gjørt uppíbygging (mín viðmerking)* ímillum okkara hús.
> Krevst ikki loyvi til slíkt millum hús ella hvussu.”

Tann 20. november 2020 sendi klagarin soljóðandi áminning til sama starvsfólk:

> ”Nú hoyrdi eg einki til hetta aftur.
> Gevur RK loyvið til at byggja so tætt millum húsini.
> Um so er, at RK gevur loyvið til hetta, so mugu vit fáa avrit av loyvinum, so man kann leggja tað saman við tryggingarskjølinum.”

Tann 20. januar 2021 spurdi klagarin aftur um málið:

> ”Hví svarar tú ikki hesum mailinum?
> Fólk kunnu ikki byggja uttan byggiloyvið.”

Tann 1. juni 2021 sendi klagarin soljóðandi skriv til høvuðstteldupostadressuna hjá Runavíkar kommunu og við avriti (c.c.) til starvsfólkið:

> ”Hey umsitingin,
>
> Havi sent tveir mailar til *eitt starvsfólk (mín viðmerking)* viðvíkjandi bygging millum grundstykkini ... og ...
>
> Undirritaði heldur ikki, at tað er loyvið at byggja á hendan hátt, og tí havi eg sent teldupost hesum viðvíkjandi.
>
> Kunnu tit svara mær fyrispurninginum?”

Sama dag fekk klagarin sjálvvirkandi móttøkuváttan frá teldupostadressuni hjá starvsfólkinum um, at telduposturin var lisin.

Tann 5. august 2021 bað klagarin starvsfólkið váttað at hava móttikið og lisið teldupostin frá 20. januar 2021. Klagarin móttók beinanvegin sjálvvirkandi váttan frá teldupostadressuni hjá starvsfólkinum um móttøku av teldupostinum frá 5. august 2021.

Tann 6. oktober 2021 sendi klagarin starvsfólkinum soljóðandi teldupost:

> ”Nú havi eg sent nakrar teldupostar til tín hesum viðvíkjandi.
> Hvussu ber tað til, at tú ikki svarar? ella vísur teldupostin víðari, so sakin kann avklárast.
> Tað eru fleiri, sum byggja uttan byggiloyvið í RK, so um skamma stund missir RK tamarhaldi á byggiloyvum.

Øll gera bara tað teimum listur, og tá verður kaos."

Tann 16. mai 2022 sendi klagarin aftur teldupost til starvsfólkið og avrit til høvuðsteldupostadressuna hjá Runavíkar kommunu:

"Nú havi eg spurt nakraferðir fyrr um bygging millum hús okkara, sjá viðheftu myndir.

Mær vitandi er tað ikki lov at seta "hetta" upp millum hús okkara.

Vinarliga svara teldupostinum!"

Tann 7. juli 2022 sendi klagarin limum í Byggi- og býarskipanarnevndini soljóðandi teldupost um málið. Telduposturin varð sendur til formannin og avrit til 4 onnur (á teirra arbeiðsadressu hjá Runavíkar kommunu):

"Hey øll í Byggi- og býarskipanarnevndini,

Kunnu tit taka hetta við á næsta fundi hjá tykkum.

Sendi ein teldupost 19. aug. 2020 viðv. bygging ... millum húsini ..., og havi sent fleiri rykkjarar síðan. Higartil hevur eingin svarað. Haldi ikki tað er gott nokk at fólk bara byggja, sum teimum lystir millum húsini, tá ið byggisamtyktir eri fyri ein bý, sum Runavíkar Kommunu."

Kunnu tit siga mær, um man bara kann byggja á hendan hátt?

Tann 8. juli 2022 svaraði formaðurin í Byggi- og býarskipanarnevndini klagaranum soleiðis og sendi avrit til hini 4 í nevndini:

"...
Eg kenni onki til hetta, men eg havi sent fyrispurningin víðari til umsitingina."

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 28. juni 2023 varð klagan send Runavíkar kommunu til ummælis við eini freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð kommunan biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Tann 18. august 2023 svaraði kommunan:

"Tað sær ikki út til, at A hevur sent klagu ... til almennu t-post adressuna hjá Runavíkar kommunu og tí er hon ikki journalisera, sum øll inngangandi mál annars verða. Klagan er hinvegin send býráðslimum og ávísum starvsfólki, men ikki til høvuðs teldupost adressuna hjá kommununi.
Klagan er sostatt hvørki journaliserað ella viðgjørd fyrisitingarliga."

Tann 21. august 2023 sendi umboðsmaðurin soljóðandi skriv til Runavíkar kommunu:

> “Viðvíkjandi klagu ... siga tit, at A ikki hevur sent klagu ... til almennu teldupost adressuna hjá Runavíkar kommunu, og tí er hon ikki journalførd ella viðgjørd.
>
> Vit skulu hesum viðvíkjandi gera vart við, at skjølini, vit sendu tykkum við teldupostunum frá A, vísa, at teldupostar hansara við fyrispurninginum um byggingina millum ... og ... og áminningarnar um málið eru sendar til *eitt starvsfólk (mín viðmerking)*, formannin og limirnar í Byggi- og býarskipanarnevndini. Teldupostarnir eru sendir til teirra teldupost hjá Runavíkar kommunu og ikki til teirra privata teldupost.
>
> Telduposturin frá 16. mai 2022 er eisini sendur cc. til høvuðsteldupostadressuna hjá Runavíkar kommunu. Eisini sæst, at formaðurin í Byggi- og býarskipanarnevndini svaraði A, at hann sendi fyrispurningin víðari til umsitingina.
>
> Vísandi til hesi viðurskifti ynskir umboðsmaðurin at fáa eina frágreiðing frá Runavíkar kommunu um, hvørja mannagongd kommunan hevur fyri journalisering av inngangandi skrivum, herundir skrivum, sum verða send starvsfólkum og býráðslimum á teirra kommunalu teldupostum.
>
> Umboðsmaðurin ynskir eisini upplýst, um kommunan nú er farin undir at viðgera fyrispurningin frá A, og nær hann kann vænta sær svar frá kommununi...”

Sama dag svaraði kommunan:

> “Vísandi til spurningin um hvussu Runavíkar kommuna journaliserar mál er at siga, at mál sum verða send almennu teldupost adressuni hjá Runavíkar kommunu runavik@runavik.fo verða upprættað og móttøkuváttan send avsendaranum.
>
> Mál sum verða send beinleiðis til starvsfólk eiga at verða send víðari til journal, men tað verða tey tíverri ikki altíð – hetta hava vit mint starvsfólkini um at gera, so vónandi verða ikki mál, sum detta ímillum sum t.d. hetta.
>
> Teldupostar, sum verða sendir býráðslimum, eru ikki partur í jornalisering. Býráðslimir eiga at vísa avsendarunum á, at mál, sum skulu viðgerðast, skulu sendast til høvuðs teldupostadressuna hjá kommununi – hetta fara vit at minna býráðslimirnir á.”

Tann 22. august 2023 spurdi umboðsmaðurin Runavíkar kommunu um mannagongdirnar um journalisering eru skrivligar, og um býráðslimir og starvsfólk eru kunnaði um mannagongdina fyri journalisering. Eisini spurdi umboðsmaðurin, um kommunan var farin undir at viðgera fyrispurningin frá klagaranum, og nær hann kundi vænta sær svar frá kommununi.

Tann 28. august 2023 svaraði kommunan:

> “Runavíkar kommuna hevur niðurskrivaða journalvegleiðing, sum starvsfólkini eru kunnaði um og eisini brúka. Býráðslimir eru ikki partur av fyrisitingini og eru ikki kunnaðir um Journal vegleiðingina.

> Mál, sum skulu viðgerðast, skulu sendast til runavik@runavik.fo og tað eru býráðslimir kunnaðir um.
>
> Viðheft er teldupostur frá *einum starvsfólki (mín viðmerking)* til A 21/8-2023"

Tann 28. august 2023 sendi umboðsmaðurin soljóðandi skriv til Runavíkar kommunu:

> "Tú hevur viðheft eitt skriv frá ... til A, dagfest 21. august 2023.
>
> Hetta skrivið tykist tó at hoyra til hitt klagumálið hjá A um vantandi innlit, og ikki til hetta málið, sum snýr seg um, at hann ikki hevur fingið svar uppá sínar spurningar um byggingina millum húsini hjá grannanum og sær.
>
> Tí verður spurt umaftur, um kommunan er farin undir at viðgera fyrispurningin frá A um byggingina millum matr. nr ... og ..., og nær hann kann vænta sær svar frá kommununi."

Runavíkar kommuna svaraði sama dag, at tey ikki skiltu spurningin, tí klagarin hevði fingið innlit í øll skjøl, og málið var endaliga viðgjørt av Byggi- og býarskipanarnevndini og býráðnum. Tá greitt var, at kommunan hevði eina misfatan av støðuni, ringdi ráðgevi hjá umboðsmanninum og greiddi frá, hvat hetta málið snúði seg um, og at hetta málið ikki var partur av einum øðrum máli hjá klagaranum um innlit.

Tann 30. august 2023 skrivaði Runavíkar kommuna soleiðis til umboðsmannin:

> "Vísandi til telefonsamrøðu í samband við innlitsumbønina frá A, so vísir seg tíverri, at fyrra málið, sum snýr seg um bygging ímillum matr. nr. ... og ... (sum er tykkara klaga ...) ongantíð er skrásett í journalini og tí havi eg hildið, at talan var um eitt og sama mál sum innlit varð søkt um og sum snúði seg um ... *aðra bygging (mín viðmerking)*.
>
> Hetta málið (byggingin ímillum matr. nr. ... og ...) er nú upprættað sum sjálvstøðugt mál í okkara journalskipan (...) og verður tikið upp á innanhýsis fundi í næstu viku ..."

Tann 15. sept. 2023 gjørdi klagarin vart við, at hann einki hevði frætt aftur frá Runavíkar kommunu um málið.

Tann 18. september 2023 fingu umboðsmaðurin og klagarin soljóðandi kunning frá Runavíkar kommunu:

> "Uppíbyggingin hjá ... skal viðgerðast sum byggimál og hava tey í dag fingið skriv um hetta. Hetta verður gjørt á tann hátt, at tey eru biðin um at søkja um byggiloyvi til gjørda arbeiðið, sum so verður viðgjørt av Teknisku deild og byggi- og býarskipanarnevndini.
>
> Tá umsóknin er viðgjørd og støða tikin til málið, frætta tit aftur."

Uppá spurningin frá klagara um, nær hetta verður gjørt, svaraði kommunan tann 18. september 2023 at vegna heystferiu verða nevndarfundirnir í oktober fluttir eina viku, so væntandi verður málið viðgjørt á fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini 25. oktober 2023.

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um handfaringina hjá Runavíkar kommunu av einum fyrispurningi um eitt byggimál og í hesum sambandi vantandi svar og vantandi skráseting av inngangandi teldupostum.

Málsgongdin vísir, at ein borgari við teldupostum javnan yvir 2 ár hevði spurt Runavíkar kommunu, íroknað starvsfólk hjá kommununi og býráðslimir, um byggiloyvi kravdist til ta bygging, sum granni hansara var í gongd við millum hús teirra, og um hann hevði fingið loyvi frá kommununi til hesa bygging.

Hóast teldupostarnar til kommunu, starvsfólk og býráðslimir, so var málið sambært frágreiðingini frá kommununi ikki skrásett í journalini, og undir málsupplýsingini í klagumálinum gjørdist greitt, at umsitingin ikki kendist við hetta málið.

Kommunan hevur greitt frá, at hon hevur eina journalvegleiðing, sum starvsfólk verða kunnaði um. Sambært hesi, skal starvsfólk, sum móttekur ein teldupost, sum hoyrir til eitt verandi mál, skráseta hetta í málið, og er talan um at stovna eitt nýtt mál, skal starvsfólkið biðja journalina stovnað eitt nýtt mál, sum starvsfólkið knýtir teldupostin í. Kommunan sigur, at hon nú hevur mint starvsfólkini á galdandi journalvegleiðing.

Eg undrast tí á, at umsitingin ikki kendist við fyrispurningin, og at hann ikki var skrásettur, tí klagarin vendi sær ikki bara til starvsfólk og býráðslimir, men sendi teldupostin frá 1. juni 2021 á sjálva høvuðsteldupostadressuna hjá Runavíkar kommunu og setti eisini kommununa á c.c. í sambandi við teldupostin frá 16. mai 2022.

Eg skal vísa á, at sum almennur myndugleiki hevur kommunan sum meginregla skyldu at svara fyrispurningum frá borgaranum og at avgreiða mál skjótast gjørligt. Ein kommuna hevur eisini skyldu til at hava slíkan røkiskap í síni skjalagoymslu, at tað ber til at prógva, hvørji skjøl eru í einum máli, og hvør viðgerð er farin fram. Uttan mun til hvør veruliga orsøkin er til, at teldupostarnir frá klagaranum ikki eru blivnir skrásettir og svaraðir, so er tað ikki nøktandi fyrisiting, at ein fyrispurningur, sum eftir míni meting krevur eina málsviðgerð og svar frá kommununi, liggur ósvaraður í gott tvey ár. Tað er eisini als ikki nøktandi, at kommunan tykist ikki at hava greiðu á, hvat er hent við málinum.

Kommunan hevur gjørt vart við, at býráðslimir eru ikki partar av fyrisitingini og eru ikki kunnaðir um journalvegleiðingina. Eisini hevur kommunan greitt frá, at teldupostar, sum verða sendir

býráðslimum, eru ikki partur av journaliseringini, men eiga býráðslimir at vísa avsendaranum á, at mál, sum skulu viðgerast, skulu sendast til høvuðsteldupostadressuna hjá kommununi. Kommunan sigur, at hetta fara tey at minna býráðslimirnar á.

Eg skal í hesum sambandi viðmerkja, at býráðslimir hava aloftast bæði eina støðu sum politikari og eina sum umsitari/avgerðarmyndugleiki í onkrari nevnd. Sum myndugleiki hava teir tá, eins og starvsfólkini, skyldu at tryggja sær, at skjøl, sum hoyra til eitt fyrisitingarligt mál, verða skrásett og gerast tøk hjá viðkomandi, sum skal viðgera málið. Eg fari tí at mæla Runavíkar kommunu til at gera leiðreglur til býráðslimirnar um, hvussu teir skulu handfara skjøl, sum teir móttaka sum partur av teirra arbeiði sum býráðslimir, so tað gerst greiðari, hvørji skjøl skulu latast umsitingini til skráseting og møguliga viðger.

**Samanumtikið**
Eg fari samanumtikið at geva Runavíkar kommunu eina átalu fyri ikki at hava handfarið hetta málið á nøktandi hátt.

Runavíkar kommunu hevur kunnað meg um, at málið nú er skrásett og undir viðgerð. Burtursæð frá omanfyrinevndu viðmerkingum og átalu, geri eg ikki meira við málið.

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður